# Tryggingarfelagið Føroyar brynjar seg til nýggjar tíðir

**Nógv er hent síðani tryggingarvirksemi byrjaði í nýggjari tíð í Kristnastovu í 1940 og fram til virksemið á Kongabrúnni í dag. Og Tryggingarfelagið Føroyar brynjar seg støðugt til nýggjar tíðir, har samskiftið við kundan hevur alstóran týdning**

Tann 1. juli 1940 varð Tryggingarsambandið Føroyar sett á stovn, sum eitt fyribils sínámillum tryggingarsamband, vegna ta serligu støðuna, ið valdaði, tá sambandið við Danmark varð slitið undir 2. heimsbardaga.

Aftaná kríggið var tað eyðsæð, at hesir stovnar høvdu røkt uppgávur sínar til fulnar. Tað sum skuldi gerast eitt fyribils samtak, var vorðin ein spírandi føroysk fyritøka, ið hevði fingið fastatøkur í føroyska vinnulívinum. Avgjørt varð tí, ikki at lata tryggingarvirksemi í Føroyum fara aftur á danskar hendur, sum tað hevði verið áðrenn kríggið.

Í 1956 kom fyrsta løgtingslóg um trygging í Føroyum. Miðskeiðis í 1970´-unum fekk tryggingarvirksemi rættuliga ferð á seg innan flestu váðaøkir og upp gjøgnum tíðirnar varð tosað um at avtaka einkarrættin. Tó var meiriluti ikki fyri hesum á Tingi fyrr enn nýggj lóggáva um tryggingarvirksemi í Føroyum varð samtykt í 1996. Lóggávan kom í gildi 1. januar 1997, nú var vegurin lagaður fyri fríari kapping.

Upp gjøgnum seinnu helvt av 20. øld var føroyska samfelagið fyri stórum broytingum og árini uttanífrá. Tryggingarøkið var ongin undantøka. Í útheiminum broytist bygnaðurin nógv innan fíggjarheimin. Tað var eyðsæð, at skuldu føroyingar fylgja við og halda áfram at veita tí føroyska vinnulívinum og samfelagnum sum heild, tað neyðugu trygdina, var nýhugsan og bygnaðar broytingar eisini neyðugar í Føroyum. Hetta gekk væl í tráð við at nýggja lóggávan, ið var komin í gildi í 1997, kravdi eina umlegging av verandi stovnum. Samráðingar vóru millum stovnarnar, um hvør bygnaður vildi geva viðskiftafólkunum størsta fyrimun, og í 1998 varð avgjørt at leggja teir verandi tryggingarstovnarnar um til eitt felag, Tryggingarfelagið Føroyar, sum vit øll kenna tað í dag.




### Kundin í fokus

Nýggjar tíðir gera, at marknaðurin er opin, og aðrir tryggingarveitarar kunnu koma úr útlondum og á Føroyska marknaðin.

Tryggingarfelagið Føroyar vil ganga á odda, og eisini brynja seg til nýggju tíðirnar. Sum ein liður í hesi gongd hava øll starvsfólk hjá felagnum í ár verið undir útbúgving, og tryggingarútbúgving og onnur neyðug útbúgving er annars nakað, ið starvsfólkini fáa støðugt.

Miðað verður eftir, at Tryggingarfelagið Føroyar gerst so kundavinarligt, sum til ber.

- Frá at kanska hava heldur tungan bygna, verður roynt at finna ein lættari og opnari bygna. Hetta verður partvís gjørt við heimasíðuni, men í hesum døgum verður eisini eitt samskiftisfólk sett í starv, sigur John Eystberg, marknaðarleiðari.

Hann sigur, at endamálið er at fara frá fakligum tryggingarpráti, til at tosa, so fólk skilja hvat tað snýr seg um, og hetta er ein tilgongd, ið er byrjað, leggur hann dent á.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

















